# Ein stevna fyri øll

**Lagt er upp til eina víttfevnda og spennandi skrá, tá fyrsta útimissiónsstevnan av slíkum slagi verður í Leguhúsinum í Nesvík dagarnar 8. til 10. september. Løgmaður fer at seta stevnuna.**

STEVNA
*Snorri Brend*



At Jóannes Eidesgaard hevur játtað at seta útimissiónsráðstevnuna kemur av, at hann hevur uttanríkismál sum málsøki. Undir uttanríkismálum er eisini menningarhjálp.

Landsstýrið hevur nevniliga hækkað menningarstuðulin til 2,7 milliónir árliga. Stuðulin verður bæði brúktur til mennandi verkætlanir og vanlukkuhjálp.

Heimamissiónin hevur í nøkur ár arbeitt við menningarhjálp millum gøtubørn í ukrainska høvuðsstaðnum Kiev. Tað eru hjúnini Jórun og Nurlan Malaikev, sum standa fyri arbeiðinum har yviri. Í løtuni hava tey eini seks hjálparfólk afturat sær, sum koma frá ymiskum londum, eisini úr Ukraina.

Í arbeiðinum millum foreldraleys børn og gøtubørn, er arbeiðið hjá Heimamissiónini eitt sokallað NGO arbeiði. NGO stendur fyri Non Govornment Organisation. Tað merkir millum annað, at tað er eitt humanitert og ópolitiskt arbeiði, sum verður gjørt fyri at hjálpa gøtubørnunum.

Ætlanin við stevnuni er tí eisini at kveikja áhuga og kalla til missión á øllum økjum í kirkjuligum samanhangi.

## FAKTA um stevnuna

Ætlanin við stevnuni er at kveikja áhuga og kalla til missión á øllum økjum í kirkjuligum samanhangi.

Á stevnuni verður eisini kunnað um teir ymsu møguleikarnar og avleiðingarnar av at fara út sum trúboðarar.

Missiónsboðini umfata øll, og tí vera tiltøk fyri allar aldursbólkar, ung sum gomul. Komið verður inn á viðurskifti frá veruleikanum, bæði áðrenn, meðan og eftir at trúboðarar hava verið úti í tænastu.

Við á stevnuni verða nógvir núverandi og fyrrverandi trúboðarar, umframt onnur, ið hava styttri royndir innan missión og hava stuðlað undir virksemið ígjøgnum nógv ár.

Stevnan fer at hava nógv at bjóða øllum aldursbólkum.

Her verður undirvísing, møti, áhugatímar, pallborðsorðaskifti, kunning um missiónsskúlar og felagsskapir, workshops og leikir.

Fleiri framsýningar verða eisini, m.a. mentanarsýningar við mati, klæðum og ymsum frá gerandisdegnum í fremmandum londum og mangt annað.

# Ein møguleiki at koma longri út

**Fleiri tiltøk sum eru málrættað til ung verða á útimissiónsstevnuni – m.a. fáa tey eina serstaka avbjóðing.**

TEY UNGU
*Snorri Brend*



**NESVÍK:** Tiltøk er fyri allar aldursbólkar á útimissiónsstevnuni, men tað eru fleiri tiltøk, sum eru ætlað til ungdómi og har ung skipa fyri.

Fríggjakvøldið verður hugnalig missións-Café, har ung skipa fyri. Her verður sangur og hugni, og fara missionerar at siga frá søgum um hendingar tey hava uppliva á teirra ferðum.



Leygardagin eru fleiri tiltøk. Til bíbiltímarnar er møguligt at velja workshops, har ein kann royna hvussu tað í veruleikanum er at klára seg úti í missión og um kvøldið er ungdómstiltak. Har fara m.a. tey, ið hava verið úti í toymisferð í Kina, Ukreina og Ísrael í summar at vísa myndir og greiða frá.

### Heima ella úti

Í fríløtunum ber til at vitja teir ymsu básarnar, har greitt verður frá missiónsmarkini og teimum ymisku missiónslondunum.

Fleiri felagsskapir eru til staðar og møguleiki er at hoyra nærri um hvørjir møguleikar eru fyri at koma út í missión í longri ella styttri tíð.

Umframt tað at vit hava áhugatímar og work-shops, vera fleiri máltíðir við rættum úr londunum har missionerar eru ella hava verið.

– So ynskir tú eitt spennandi vikuskifti, so kom á útimissiónsstevnuna í Nesvík og fá møguleika fyri at uppliva nakað, ið varðir langt inn í framtíðina, siga fyrireikararnir um stevnuna.

# Børnini á flog til tað fremmanda

**Foreldrini nýtast ikki at setast aftur til stóru stevnuna. Serstøk barnaskrá er til tiltakið.**

BØRNINI
*Snorri Brend*

**NESVÍK:** Til flestu av møtunum, bíbiltímunum og pallborði, eru tiltøk fyri børn og tilboð um barnaansing, so børnini koma ikki at keða seg.

Foreldrini hava her møguleika at luttaka í øllum sum gongur fyri seg. Millum annað verður ein flogferð til eitt fremmant land har tey sleppa at uppliva mangt og hvat.

Børnini sleppa eisini at mála eitt heimskort ella eitt Afrika-kort, ið skal hangast upp og vera ein partur av stevnuni.

Sunnudagin er sunnudagsskúli og har verður ein sjónleikur um Jónas, hvalin og Ninive á skránni. Barnakórið á Toftum kemur at syngja, og eisini verður tað, sum børnini hava gjørt í vikuskiftinum lagt fram. Sangirnir vera eisini frá øðrum londum.

# Døgurðin verður á gólvinum

**Luttakararnir fáa upplivingar til flestu sansirnar á útimissiónsstevnuni. Millum annað verða eksotiskir rættir úr Afrika og Ukreina á matarskránni. Døgurðin leygardagin skal njótast á gólvinum, uttan knív og gaffil.**

MATURIN
*Snorri Brend*

**NESVÍK:** Tey, sum eru úti í missiónstænastu, mugu venja seg við nógvar síður av mentanini m. a. øðrvísi mat. Hvussu hetta er, sleppa luttakararnir á útimissiónsstevnuni sjálvandi eisini at royna í ávísan mun.

Fríggjakvøldið verður eitt serstakt ukreinskt á skránni. Ein ukreinsk suppa, sum Jórun Malaikev er komin við uppskriftini til, verður á skránni.

Leygardagin á døgurða verður ein rættur úr Mauritania á skránni, sum Maureen Clarke er komin við. Í sambandi við hesa máltíðina, so verður eisini etið eins og tað verður etið í Afrika, nevniliga á gólvinum. Tað vil siga, at til hesa máltíðina verða gaffil og knívur ikki nýtt.

– Maturin er nakað øðrvísi enn vit vanliga eta, men tað verður tó ikki nakað, sum vit føroyingar ikki dáma.

– Tað verður kanska ikki so nógv av eplum, men meir av rísi og kryddaríum. Um tað eru eldri fólk ella onnur, ið ikki klára at sita á gólvinum, so kunnu tey tó fáa mat við borðið, sigur Jóhanna Olsen úr Porkeri, ið er ein av teimum, ið skipar fyri og verður kokkur á útimissiónsstevnuni.

Hon sigur, at ætlanin eisini er at hava onkran annan serligan 'missiónsmat' á skránni til onkra av hinum máltíðunum.